Mentanarnáttin 2002:

# Ein upplagdur møguleiki at hitta fólk

**Fríggjakvøldið 7. juni var aftur mentanarnátt í Havn. Skipað varð fyri ymsum tiltøkum runt í um í býnum, og góða veðrið gjørdi tað bara betri**

MENTANARNÁTT
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Klokkan er átta á kvøldi, og tú uppdagar beinanvegin, at okkurt serligt er á vási. Óvanliga nógv fólk er úti, og parkeringsplássið uttanfyri SMS er stúgvandi fult av bilum – ironiskt, hóast alt, tá sólin hevur hitað um alt landið allan dagin. Men sjálvt um hitastigini hava verið óvanliga nógv, verður bilurin ikki standandi í túninum.

Og talið av fólki inni í SMS samsvaraði við bilarnar uttanfyri. Tá klokkan var farin eitt sindur av átta spældu All That Rain á torginum, og til tíðir varð tað eitt sindur trongligt. Fólk í øllum aldri, barnavognar, konur við stórum búki, børn og ein rúgva av tannáringum. Men hetta sigur seg kanska sjálvt, tí lítla løtu frammanundan hevði Brandur Enni verið á pallinum. Runt í øllum meldrinum, gingu menn frá vaktargarðinum, og syrgdu fyri at alt gekk fyri seg á sømiligan hátt.



*Fríggjakvøldið vóru fleiri orkestur á palli á torginum í SMS, og var eitt teirra All That Rain*

## Miðbýurin

Eftir eina hugnaliga løtu í SMS, gekk leiðin oman í miðbýin. Har vóru eisini ymisk tiltøk á skránni, men ikki so nógv fólk vóru at síggja. Tó meira enn eitt vanligt fríggjakvøld um hesa tíðina.

Frammanfyri Býráðshúsið, í tí setandi sólini, spældi Chaldur, sum spælir jazz. Nøkur fá fólk høvdu nýtt høvi til at koma saman og njóta henda eitt sindur øðrvísi tónleik.

Runt um á gongugøtuni standa smáir bólkar av fólki og práta. Og á Ebenezer trappuni standa ung og syngja kórsang, meðan ein lítil áhoyrarafjøld lurtar.

Føroyingar eru kanska eitt fólkaslag, ið velur at halda seg innandura, tí tað vóru ikki so nógv fólk í miðbýnum um níggju tíðina fríggjakvøldið, sjálvt um veðrið var av tí allarbesta. Men á teimum, sum úti vóru, sást týðiliga, at sólin hevði verið frammi, tí tann vanliga bleika húðin var vorðin reyð av hitanum.



*Chaldur spældi frammanfyri býráðshúsini í tí setandi sólini fríggjakvøldið*

Og hinvegin, kanska føroyingar eru náttarravnar, tí ímóti midnáttarleiti var ein rúgva av fólki í miðbýnum, har tú fekk varhugan av, at hetta var mestsum ein lítil ólavsøka. Ein stór fjøld av fólki spákaði aftur og fram, og tað var ógvuliga ljóst úti, næstan sum á alljósum degi.

Mentanarnáttin er eitt upplagt høvi at hitta fólk, práta, spáka runt í býnum og kanska enntá keypa okkurt fyri at vera eitt sindur betri við teg sjálvan enn tú vanliga hevði verið.

Fólkið, tað góða veðrið og prátið ger, at tú skjótt fer at hugsa um tann so vælkenda sangin hjá Louis Armstrong: "...I see friends shaking hands, saying 'How do you do?', what they really say, is 'I love you'...". Ja, Havnin var veruliga "A wonderful World" fríggjakvøldið



*Heilt hampuligt av fólki var í miðbýnum tíðliga um kvøldið, men ímóti midnáttarleiti var miðbýurin fullur av fólki. Næstan sum ein lítil ólavsøka*



Long ferð við tyrluni:

# 99 ára gomul endaði aftur í Klaksvík



*Túrurin hjá eini 99 ára gamlari konu úr Klaksvík til Svínoyar gjørdist heldur longri enn ætlað. Hon endaði nevniliga aftur í Klaksvík, eftir at flogskipararnir lótu hana sita eftir í tyrluni*

**Ferðin hjá einari 99 ára gamlari konu úr Klaksvík til Svínoyar gjørdist heldur longri enn ætlað. Flogskipararnir lótu hana sita eftir í tyrluni, og hon endaði tí aftur í Klaksvík**

FLOGFERÐ
*Stefan í Skorini*

Eini seks fólk vóru við tyrluni, sum fríggjamorgunin fór út til Svínoyar. Ein 99 ára gomul kona og sonur hennar, tríggir fugloyingar og ein maður, sum skuldi umvæla antennu á Eysturhøvda á Svínoynni.

Tá tyrlan lendi í Svínoy, fingu ferðafólkini boð um at fara úr henni, tí hon skuldi niðan á Eysturhøvda, áðrenn hon helt leiðina fram til Fugloyar.

Fólkini fara síðani úr tyrluni, og sonur ta gomlu konuna skal fara yvir til hurðina at hjálpa móðir síni úr tyrluni, men áðrenn hann veit av, fer tyrlan upp frá aftur og heldur leiðina niðan á Eysturhøvdan við gomlu konuni umborð.

Flogskipararnir høvdu givið manninum, ið tekur sær av tyrlupallinum í Svínoy, boð um, at tann gamla konan kundi sleppa úr tyrluni, tá teir komu aftur av Eysturhøvdanum, tí hon var so illa gongd.

Ímeðan tyrlan er á Eysturhøvdanum, fær hon boð um at fara til havs, tí ein maður á russiskum trolara hevði fingið skaða.

## Aftur í Klaksvík

Áðrenn tyrlan fer til havs, setir hon seg í Klaksvík at bunkra, og boð verða send eftir sjúkrabilinum at koma eftir gomlu konuni. Sum skilst fór sjúkrabilurin sum í neyðsendarørindum niðan á tyrlupallin eftir konuni, tí teir hildu, at hon aftur skuldi leggjast á sjúkrahúsi, haðani hon júst var komin.

Ímeðan standa fólk í Svínoy og bíða eftir tyrluni við gomlu konuni, men hon kemur ikki vegin fram.

Tá tyrlan kemur aftur til lands, fer hon aftur til Klaksvíkar eftir gomlu konuni, sum loksins sleppur aftur til Svínoyar seint seinnapartin.

Sonur ta gomlu konuna skilir ikki, hví hon ikki slapp úr tyrluni beinanvegin, tí tað hevði ikki tikið so ómetaliga langa tíð at fingið hana úr. Hon var ikki væl fyri, tá hon einaferð kom aftur til Svínoyar, tí hon er so gomul og hevði júst verið innløgd.

Hesin túrurin hjá henni tók longri tíð enn við gamla Immanuel, sum fyrr sigldi til Svínoyar.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

## Sterkur illgruni um ILA á Gøtuvík

ILA
*Stefan í Skorini*

Tað tykist, sum ILA fer at raka tey flestu alibrúkini í landinum. Nú er sterkur illgruni um, at alibrúkið á Gøtuvík hjá partafelagnum Luna í Gøtu er rakt av ILA sambært stjóranum í felagnum, Atla Gregersen.

Hann upplýsir, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tikið royndir í ringunum. Úrslitið av royndunum er ikki greitt enn, og tí er einki staðfest, men Atli Gregersen væntar, at alibrúkið fær tung boð, tá úrslitið er greitt.

Smittan er staðfest á Lambavík, sum liggur nærhendis, fyri fleiri mánaðum síðani, og møguliga er tað hiðani, at alibrúkið á Gøtuvík hevur fingið ILA.

## 1.200 krónur stolnar úr skiftingarrúmi

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin hevði svimjihøllin í Klaksvík óbodnar gestir. Eftir at hava verið úti í hylinum varnaðist ein av teimum vitjandi, at 1.200 krónur vóru horvnar úr klæðunum hjá honum. Hann boðaði løgregluni frá, men eingin veit at siga, hvør hevur tikið pengarnar.

Løgreglan í Klaksvík tók leygarkvøldið stutt fyri midnátt ein bilførara í Klaksvík, sum koyrdi við kenning. Blóðroynd varð tikin, og hann verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

## Rýmdi frá óhappi

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan tók fríggjakvøldið ein mann, sum var rýmdur frá einum óhappi. Bilurin, hann koyrdi í, rendi á ein parkeraðan bil á Norðasta Horni. Bilførarin koyrdi tó víðari, men fólk sóu tilburðin.

Løgreglan tók føraran eina løtu seinni, og tað vísti seg tá, at hann var ávirkaður. Hann er tí skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring og fyri at rýma frá einum óhappi.

Sunnumorgunin steðgaði løgreglan tveimum bilførarum, ið eisini eru skuldsettir fyri at koyra við kenning. Blóðroyndir eru tiknar, og teir fáa boð frá løgregluni seinni.

Av støðini í Havn verður sagt, at vikuskiftið hevur verið friðarligt, og tað sama kann sigast um alt landið. Møguliga hevur góðveðrið havt eina positiva ávirkan á fólk.

## 16 ára gamal koyrdi við kenning

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Runavík fekk sunnumorgunin beint fyri klokkan seks fráboðan um, at ein bilur koyrdi heldur ófantaliga á landsvegnum við Skálabotn.

Løgreglubilurin fór avstað og steðgaði einum bili. Tað vísti seg, at tað var ein 16 ára gamal drongur, sum var farin ein túr við bilinum hjá foreldrunum. Hann var ávirkaður av rúsdrekka og hevði sum vera man einki koyrikort.